*Inge Lønning, norska umboðið í formansskapinum í Norðurlandaráðnum: –Er semja millum Danmark og Føroyar síggi eg nakran trupulleika í, at Føroyar fáa fullan limaskap.*

*Mynd Jens K Vang*



**-Tað er ikki spurningurin, um tað tekur eitt ella tvey ár. Avgerandi er, at tað hendir sigur norski limurin í formansskapinum í Norðurlandaráðnum, Inge Lønning, sum fegin sær, at Føroyar fáa fullan sjálvstøðugan limaskap í Ráðnum.**

NORÐURLANDARÁÐIÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Norski Inge Lønning í Norðurlandaráðnum:

# – Noreg eingin forðing fyri føroyskum limaskapi

– Eg haldi, at tað hevur verið ein sera positiv gongd í hesum máli, nú vit hava fingið eina serfrøðingarfrágreiðing, ið setir til viks allar løgfrøðiligar forðingar fyri føroyskum sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum. Hetta sigur Inge Lønning, norskur limur í formansskapinum í Norðurlandaráðnum. Hann hevur júst verið á fundi í Føroyum, har norðurlendski limaskapurin var til viðgerðar.

Inge Lønning sigur, at sambart nýggju frágreiðingini eru nú ongar serstakar løgfrøðiligar forðingar fyri fullum føroyskum limaskapi, og tað merkir í praksis, at tað nú eru reint politiskir spurningar støða skal takast til, áðrenn endaligur føroyskur limaskapur kemur uppá pláss.

– Vit skilja sera væl ynskið hjá føroyingum at fáa fullan sjálvstøðugan limaskap, men norska støðan er eisini tann, at vit ynskja ikki at leggja okkum út í tær bilaterala avtalur, sum eru galdandi millum Føroyar og Danmark og Grønland ella Finland og Áland.

– Men um er semja er í tingunum og stjórnunum í Føroyum og Danmark um limaskap, hvør er so norska støðan til fullan limaskap?

– Tá fara vit frá norskari síðu ikki at hava nakað ímóti fullum limaskapi.

– Merkir tað, at sama málið fer ikki at seta fót fyri føroyska ynskinum um limaskap?

– Tað er møguligt, at norska stjórnin vil viðgera tað málið eisini, um talan verður um umfatandi broytingar í Helsingforsavtaluni. Men eg rokni ikki við, at hetta fer at vera nøkur treyt.

– Heldur tú, at man í næstu framtíð fer at síggja Føroyar sum fullgyldugan lim í Norðurlandaráðnum?

– Ja tað haldi eg. Tað nýtist ikki at taka langa tíð. Men tað er ikki avgerandi, um hetta tekur eitt ella fleiri ár. Bara tað hendir er mest umráðandi.

– So tú sær sjálvur fegin, at Føroyar fáa fullan sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum!

**-Ja.**

---

Svii um føroyskan limaskap:

# – Mugu vita hvat hetta inniber

**– Ein týðandi forðing er burtur, nú einki í fólkarættinum er til hindurs fyri fullum føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum. Nú er tað tó upp til stjórnirnar at meta um, hvat hesin limaskapur inniber sigur Gabriel Romanus, svenska umboðið í formansskapinum í Norðurlandaráðnum.**

NORÐURLANDARÁÐIÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Hetta hevur verið ein frálíkur fundur, og nú skulu vit halda fram við at tosa um, hvussu vit kunnu fáa Føroyum fleiri rættindi á jøvnum føti við aðrar. Hetta sigur svenska umboðið í formansskapinum í Norðurlandaráðnum, Gabriel Romanus við Sosialin, eftir fundirnar, sum hava verið í formansskapinum í Havn hesar seinastu dagarnar.

Gabriel Romanus heldur tað eisini vera gott fyri málið, at tað nú er komið fram, at ongar løgfrøðiligar ella fólkarættarligar forðingar eru fyri fullum føroyskum limaskapi. Hann vísir tó í sama viðfangi á, at føroysku limirnir í Norðurlandaráðnum í dag hava javnbjóðis rættindi og fullan atkvøðurætt sum hinir limirnir. Føroyingar kunnu eisini veljast til bæði forseta og varaforseta í sjálvum Norðurlandaráðnum, sum fevnir um tinglimur úr teimum norðurlendsku parlamentunum, so har eru ongar avmarkingar. Nú snýr tað seg tó meira um sjálvt Ráðharraráðið enn um parlamentariska Norðurlandaráðið. Hvussu tú skal handfara spurningin um møguligar komandi føroyskar limir í Ráðharranum. Skulu teir hava somu rættindi sum hini stjórnarumboðini!

– Hvør er tín støða til tann spurningin sum umboð fyri Svøríki?

– Vit mugu útgreina, hvat hetta ber við sær ítøkiliga. Og tað hava vit ikki gjørt enn. Vit kunnu staðfesta, at slíkur fullur limaskapur hevur ikki tær stóru broytingarnar við sær, tá talan er um Norðurlandaráðið. Tað verða helst størri broytingar, tá talan er um Ráðharraráðið. Tí er hetta ein spurningur, sum stjórnirnar mugu tosa um og ikki parlamentarikararnir.

– Men sær tú trupulleikar í at røkka á mál – at fáa konsensus um broyting í Helsingforsavtaluni?

– Tað geri eg ikki. Men hetta er eitt mál fyri stjórnirnar.

Gabriel Romanus sigur víðari, at nú má Ráðharraráðið í Norðurlandaráðnum taka málið upp og seta út í kortið. Her eru nógvir spurningar at taka støðu til: verður talan um vetorætt fyri allar partar ella skal atkvøðast í Ráðharraráðnum, har Føroyar skulu hava eina atkvøðu eins væl og Danmark, sum hevur 5 mill. í búgvar, meðan tað einans búgva 50.000 fólk í Føroyum!

Sjálvur heldur Gabriel Romanus, at man eigur at arbeiða við at skapa semjur, tvs. konsensus millum stjórnirnar, heldur enn at tosa um atkvøðurætt. Tað fer at geva besta úrslitið, og tað haldur hann eisini verður arbeitt við longu nú.

Gabriel Romanus leggur aftrat, at Svøríki leggur seg ikki út í spurningar, sum eru millum Føroyar og Danmark, men landið ynskir, at man framhaldandi hevur eitt effektivt Ráðharraráð og skulu broytingar gerast í Helsingforsavtaluni, so má man eisini tryggja sær at hava eitt effektivt ráð.